

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 02 - 2012

# Eingin politisk hjálp til smá feløg í Noregi

Tey smáu feløgini í Noregi, sum stríðast við at fáa endarnar at røkka saman, skulu ikki rokna við, at fáa hjálp frá politisku myndugleikunum, ið varða av oljuvinnuni. Aðalskrivan í Olje- og energidepartementet, Rune Henriksen, váttar fyri Petromagasinet, at tey ikki arbeiða við hesum í løtuni. Somuleiðis sigur olju- og orkuráðharrin Ola Borten Moe, at hann ikki sær tað sum teirra trupulleika, at nøkur smærri feløg í norsku oljuvinnuni sigla í tungum sjógvi fíggjarliga. "Eftir mínum tykki hava vit eina góða skattaskipan, sum við stuðulskipanum hevur tryggjað, at vit fingu fleiri aktørar á landgrunnin. Annars vil eg gera greitt, at tey feløg, ið hava loyvir og ætla at verða partur av landgrunninum, skulu hvíla hampiligt fíggjarliga. Talan er um stórar íløgur og tá skulu feløgini vera før at bera eitt sindur, eisini hóast alt ikki gongur sum ætlað," sigur norski olju- og orkuráðharrin við Petromaganiset.